Aksel V. Johannesen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um hjálparpakkar til íverksetarar og smærri vinnurekandi, settur landsstýrismanninum við umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Heldur landsstýrismaðurin, at íverksetarar og smærri vinnurekandi hava fingið nóg góðan stuðul til at klára seg ígjøgnum koronutíðina?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at endurskoða Hjálparpakka 2 og umsitingina av hesum?
3. Kunnu íverksetarar og smærri vinnurekandi vænta sær størri stuðul frá landsstýrinum í sambandi við íkomnu støðuna við koronusmittuni?

Viðmerkingar:
Í apríl mánaði samtykti Løgtingið Hjálparpakka 2, ið var ein stuðul til vinnuna, sum eftir tilmæli frá landsstýrinum legði nógv ella alt virksemið stilt í fleiri mánaðir. Stuðulin var til skjalprógvaðar, fastar rakstrarútreiðslur, og at rokna sum fastar rakstrarútreiðslur vóru húsaleiga, rentur, trygging, óuppsigiligar avtalubundnar útreiðslur í tíðarskeiðinum, el, hiti o.a. Í umsóknarblaðnum varð stuðulin tilskilaður í nevndu øki, harumframt var ein teigur til aðrar útreiðslur. Men fleiri fyritøkur hava merkt, at virksemi teirra ikki varð fevnt av stuðlinum frá landinum, tí at talan ikki er um fyritøkur av siðbundna slagnum við jøvnum, føstum útreiðslum. Sum dømi kunnu nevnast ferðavinnufyritøkur, har rakstrarútreiðslurnar sveiggja nógv gjøgnum árið og har marknaðarføring áðrenn háárstíð er ein stórur og neyðugur partur av virkseminum. Marknaðarføring varð ikki góðkent sum aðrar rakstrarútreiðslur sambært Hjálparpakka 2. Fleiri av hesum fyritøkunum heftu sostatt fyri útreiðslur til tilfar og framleiðslur, sum vóru avtalaðar áðrenn korona fór at gera um seg, og sum tær tí ikki sluppu undan. Hetta hevur sett nógvar íverksetarar og smærri fyritøkur í eina svára støðu. Spurningurin er, um Hjálparpakki 2 tænir endamálinum til fulnar, ella um umsitingin av hjálparpakkanum møguliga er grundað á eina avmarkandi fatan av hugtakinum rakstrarútreiðslur.

At MVG fyri fyrsta ársfjórðing varð útsett, hjálpti væl hjá summum fyritøkum, men í oktobur mánaði, tá stuðulin varð gjørdur upp, fingu fleiri fyritøkur stórar rokningar frá TAKS, tí stuðulin ikki varð góðtikin av omanfyrinevndu orsøkum, og hartil sera stutta freist til at rinda bæði stuðul og MVG aftur. Hetta var í sama ári, sum virksemið steðgaði, og meðan koronusmittan framvegis gjørdi um seg og forðaði virkseminum.

Seinastu árini hava vit sæð ein stóran vøkstur av smáum fyritøkum í føroyska vinnulívinum. Undanfarna samgonga gjørdi tað lættari at stovna og reka vinnufyritøkur í vinnufelagsformi, og síðan 2017 eru fleiri hundrað nýggj íverksetarafeløg sett á stovn. Við hesum er komið eitt størri fjølbroytni í vinnulívið og við fleiri aktørum í vinnuni, verða virðini savnað á fleiri hondum. Men nógvar av hesum smáu og nýstovnaðu fyritøkunum eru sera merktar av koronusmittuni, og tí er vandi fyri, at tær mugu snara lyklinum eina seinastu ferð. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 23. februar 2021

Aksel V. Johannesen